# Avgerandi kvinnudystur

**FLOGBÓLTUR Dysturin í Sørvági sunnudagin millum SÍ og Fleyr kann gerast avgerandi fyri, hvussu FM-finalan hjá kvinnunum verður mannað hesa ferð**

Hilmar Jan Hansen



AVGERANDI

*Dysturin sunnudagin millum SÍ og Fleyr er ein, hvørki av liðunum – og slett ikki SÍ – hevur ráð at tapa*

Mynd: Álvur Haraldsen

Sunnudagin verður spældur ein av mest avgerandi dystunum í Eik-liguni hjá kvinnum hetta kappingarárið. Tað er dysturin í Sørvági millum SÍ og Fleyr, sum bæði – í harðari kapping við oddaliðið, Mjølnir – liggja framvið at sleppa í FM-finaluna.

Serliga heimaliðið er undir trýsti undan dystinum, tí vinnur Fleyr, fer Fleyr fýra stig fram um SÍ, samstundis sum ein Mjølnir-útisigur á TB merkir, at Mjølnir verður fimm stig framman fyri SÍ.

Fleyr tolir hinvegin eitt tap, tí liðið verður framvegis framman fyri SÍ, tó at stigatalið hjá liðunum báðum tá verður tað sama. Tískil verður hetta ein av teimum dystunum, har liðini bókstaviliga vilja gera alt fyri at vinna.

## Tvær ferðir Mjølnir

Hjá monnunum skal Mjølnir tvær ferðir í eldin, fyrru ferð í kvøld suðuri í Trongisvági ímóti TB. Hóast TB hevur vunnið tvey sett ímóti Mjølni í vetur, eru klaksvíkingarnir stórfavorittar.

Ikki minni týdning fær hinvegin dysturin sunnudagin, tá Mjølnir tekur ímóti Fleyr. Hóast Fleyr sær út til at vera fokið í oddastríðnum, kunnu havnarmenn framvegis bíta frá sær og gera kappingina um annaðplássið spennandi.

SÍ, sum er hitt liðið, ið eins og Mjølnir møguleika at møta ÍF í FM-finaluni, skal á útivølli spæla ímóti júst ÍF, og tað má tí metast sum ein serstakliga torførur dystur hjá sørvingum. Vinna teir hann, mugu teir tó framvegis roknast sum eitt sera gott finaluboð.

### Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 17 | 15 | 2 | 48 | 10 | 38 | 18 |
| 2 | Fleyr | 17 | 14 | 3 | 45 | 17 | 28 | 17 |
| 3 | SÍ | 17 | 13 | 4 | 42 | 21 | 21 | 15 |
| 4 | ÍF | 17 | 9 | 8 | 32 | 29 | 3 | 10 |
| 5 | TB | 17 | 8 | 9 | 30 | 35 | -5 | 9 |
| 6 | Ternan | 17 | 4 | 13 | 17 | 43 | -26 | 5 |
| 7 | Dráttur | 17 | 2 | 15 | 21 | 47 | -26 | 3 |
| 8 | KÍF | 17 | 3 | 14 | 14 | 47 | -33 | 3 |

26/02 15.00 Ternan-KÍF
26/02 16.30 Dráttur-ÍF
27/02 14.30 TB-Mjølnir
27/02 15.00 SÍ-Fleyr

### Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 17 | 15 | 2 | 47 | 14 | 33 | 20 |
| 2 | Mjølnir | 17 | 10 | 7 | 35 | 27 | 8 | 13 |
| 3 | SÍ | 17 | 10 | 7 | 39 | 24 | 15 | 12 |
| 4 | Fleyr | 16 | 7 | 9 | 24 | 33 | -9 | 9 |
| 5 | TB | 17 | 0 | 17 | 4 | 51 | -47 | 0 |

25/02 21.30 TB-Mjølnir
27/02 15.00 ÍF-SÍ
27/02 15.00 Mjølnir-Fleyr



GULLVINNARI

*Jan Pytlick hevur sum venjari vunnið tvær ferðir OL-gull og hevur eina ferð verið europameistari við danska kvinnulandsliðnum í hondbólti*

*Mynd: Gorm Kallestad/Scanpix*

# Forkunnug hondbóltsvitjan

**HONDBÓLTUR Venjarin hjá danska kvinnulandsliðnum, Jan Pytlick, er um vikuskiftið gestur hjá Hondbóltssambandinum. Hann fer at hava venjing við manslandsliðnum og fyrilestur um landsliðsarbeiði**

Hilmar Jan Hansen

Talan er um forkunnuga vitjan, tí Jan Pytlick hevur drúgvar royndir sum kvinnulandsliðsvenjari hjá Danmark í eini 12 ár tilsamans, har hann hevur leitt liðið ígjøgnum bæði EM- og HM-endaspøl og OL. Eitt nú hevur hann við donsku hondbóltskvinnunum vunnið OL-gull í 2000 og 2004 og EM-gull í 2002, umframt EM-silvur í 1998 og 2004.

Leygardagin verður hann við í KÍ-høllini í Klaksvík, tá føroyska manslandsliðið venur. Fyrrapartin fylgir við venjingunum hjá Dia Midjord, landsliðsvenjara, og seinnapartin venur Pytlick sjálvur menninar í ein tíma.

Eftir venjingina fer hann klokkan 16 at hava fyrilestur í Ósáskúlanum, har evnini verða uppbygging av einum landsliði og vinnaratoymi, umframt at Jan Pytlick tosar um olympiskar leikir og fortelur søgur frá síni landsliðsvenjaratíð.

Fyri at fáa sum mest burtur úr vitjanini, hevur Hondbóltssambandið sent venjarum og hondbóltsfólki innbjóðing til at fylgja venjingini, sum verður í Klaksvík, og somuleiðis at vera við til fyrilesturin, ið uttan iva hevur stóran áhuga millum spælarar, venjarar og hondbóltsáhugaðar føroyingar annars.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Hylurin klárur í heyst



**SVIMJING Nógv bendir á, at 50 metra kappingarhylurin í Vági verður tikin í brúk í heyst. Í vikuni høvdu stigtakarar og verkætlanarbólkur framløgu fyri løgtingsfólkum**

Uni Holm Johannesen

Verkætlanarbólkurin, ið arbeiðir við svimjihylinum í Vági, væntar at fáa játtaðar fýra milliónir krónur í stuðli frá løgtinginum. Tað er umleið triðingurin av samlaða kostnaðinum, sum er 12,2 milliónir krónur, uttan meirvirðisgjald.

Eftir fundin við løgtingsfólkini vóru stigtakararnir bjartskygdir: – Politikarnir vóru sera positivir, og sum eg skilji, so stendur hylurin klárur í heyst, sigur Jón Bjarnason, sum væntar, at hann og Pál Joensen fyrireika seg til olympisku leikirnar í London í 2012 við at venja í egnum 50 metra hyli í Vági.

Ein slíkur svimjihylur skal fyrst og fremst gagna føroyskari svimjing, men flestu føroysku svimjarar høvdu havt lættari atgongd til hansara, um hann var í miðstaðarøkinum. Hesum tekur Jón Bjarnason undir við, men vísir á, at verkætlanin í Vági er bílig, tí hylurin fær hita frá SEV-verkinum.

– Ein 50 metra kappingarhylur í Vági útilokar ikki ein 50 metra kappingarhyl í miðstaðarøkinum, sigur hann.

*uni@sosialurin.fo*